# PostTøkan

– nýggj tænasta frá Postverki Føroya

**PostTøkan hevur eisini opið uttan fyri vanliga upplatingartíð – gerandisdagar frá 9 til 19 og leygardagar frá 10 til 16**




Sjálvtøkurnar, ið hava fingið heitið posttøkur, eru sum lítil posthús, har tú kanst avgreiða flestøll vanlig postørindi – alt frá at senda brøv og pakkar til at keypa frímerki, bjálvar og postkort.

Fyrsta PostTøkan verður uppsett á Óðinshædd í Havn. Fleiri verða uppsettar kring landið seinni.

**Við PostTøkuni kanst tú:**

» Máta og viga brøv og pakkar
» Keypa frímerki, og bjálvar
» Senda brøv og pakkar innanlands og uttanlands
» Finna tín pakka (Track&Trace)
» Rinda við gjaldkorti og fáa kvittan fyri títt keyp

Nýggja posttøkan fer at standa í gongini millum Bónus og Postverkið á Óðinshædd, og fyrstu dagarnar verður fólk frá Postverkinum á staðnum til at vegleiða, um einum tørvar hjálp.

*Postverk Føroya gleðir seg at veita nýggju tænastuna og vónar, at hon verður ein góður lutur í tínum gerandisdegi.*

Postverk Føroya

SENDISTOVAN